# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óvanlig uppskot verd at umhugsa

Tað er ikki ov nógv sagt, at landsstýrissamgongan hevur fleiri stórar politiskar trupulleikar at dragast við. Tað er heldur ikki ov nógv sagt, at samgongan fyri almenninginum stendur sum lamsligin, og at atgerðarloysið alt meira eyðkennir myndina av eini samgongu, sum annars legði hart út við stórpolitiskum málum.

Størstu trupulleikarnar hevur samgongan av fiskivinnupolitikkinum og av tunnilsmálunum, og næstu vikurnar verða helst avgerandi, hvørt samgonguni yvirhøvur verður politiskt lív lagað. Útlitið til, at Gerhard kemur til sættis við samgonguna eru smá, tí løgmaður og Gerhard hava longu málað seg inn í hvør sín krók. Teir koma valla út úr krókunum uttan, at sporini í politisku gólvmálingini gerast so greflig, at eingin politiskur málari, hann veri seg so hegnigur sum hann vera vil, megnar at umvæla hesar blettir. Hvat fiskivinnupolitikkinum viðvíkur, so er ivin í nógvum politiskum legum stórur og tær útmeldingar, sum higartil eru komnar frá andstøðu og samgongulimum eru ikki bara jaligar.

Vit skulu ikki royna at spáa um úrslitið av uppskoti fiskimálaráðharrans um at fylgja fiskifrøðingunum, tá fiskidagarnir skulu ásetast í fyrsta tingmálinum í tí tingsetu, sum byrjar Ólavsøkudag, men bert vóna at vit og skil koma at ráða, so vit í framtíðini kunnu hava eina burðardygga fiskivinnu. Hetta er hóast alt alfa og omega fyri vinnubúskap okkara. Okkurt kundi bent á, at hetta fer at hepnast.

Í tunnilstrætuni sær verri út og kanska skuldi løgmaður, sum hevur evtsu ábyrgd av samgongusamstarvinum nú roynt at umhugsa tey eitt sindur óvanligu hugskot, sum í seinastuni eru komin alment fram. Eitt er hugskotið hjá fyrrverandi tingmanni Fólkafloksins í Sandoy og frá einum borgara. Annar mælir til at bíða við at skerja blokkin við 100 milliónum og heldur nýta upphæddina til Sandoyartunnilin. Hin mælir til at at lata brúkarарnar av verandi tunnlum og komandi bera ein part av útreiðslunum av Sandoyartunnlinum.

Talan er um óvanlig og óvæntað uppskot. Tað er óvæntað, at ein fólkafloksmaður mælir frá blokkniðurskurði. Hitt uppskotið er óvanligt, tí tað er sjáldan, at ein borgari stígur fram og mælir til samhaldsfesti við øktum brúkaragjøldum. Men tað má ásannast, at bæði hugskot eru áhugaverd og als ikki heilt órealistisk. Gamalt var, at um maður hevði ferniserað gólv til jólar og, sum ikki sjáldan hendi, var endaður í króki, vórðu turrar fjalir lagdar eftir nýsmurda gólvinum. Hetta fekk mann og gólv heilskapað burturúr neyðini. Kanska skuldu løgmaður og Gerhard fingið onkra góða politiska handverkarafyritøku, (men hon skal nokk ikki eita Kári & Kári) at lagt nakrar politiskar fjalir inn eftir nýmálaða gólvinum, so teir sluppu út aftur í fríska luft og fingu hugsað klárt. Kanska eru hesi ótraditionellu uppskot veruliga verd at umhugsa nærri, so vit sleppa undan politiskari kreppu á ólavsøku.

**Sosialurin**

## Svarið til Sandoynna og restina av suður-Føroyum



GERHARD LOGNBERG

Nú hevur Sandoyggin fingið svar frá løgmanni og samgonguni. Har stendur týðuliga, hvat samgongan ætlar við Sandoynni og Suðuroynni.

Løgmaður svarar, at ikki verður byrjað upp á tunnilin fyrr enn aftann á 2011. Um Skálafjarðartunnulin skrivar løgmaður, eg siteri:

"Alt bendir á, at Skálafjarðartunnulin verður tann fyrri," sitat slut.

Nær verður so byrjað við Sandoyartunnlinum, eg spyrji bara? Tað tekur tvey ár at kanna og útbjóða Eysturoyðartunnilsætlanina og onnur fýra ár at bora hann ígjøgnum. So her sær man viljan hjá samgonguni mótvegis Sandoynni og Suðuroynni, hann er næstan minni enn einki!

Vit hava fingið at vita, at einastu sýslur í Føroyum, sum ganga aftur í fólkatali, eru Sandoyar sýsla og Suðuroyar sýsla, men tað tykist ikki at ávirka samgonguleiðaran.

**Atlit skulu takast sigur løgmaður?**

Vit skulu taka atlit til búskaparlig viðurskifti, sigur samgonguleiðarin. Eg kann nevna nøkur dømi, um ætlanir hjá samgonguni:

- Lækka ríkisveitingina
- avtaka sjómansfrádráttin
- Seta pensiónsaldurin upp í 71 ár
- Lóggeva grundarlagið undan arbeiðarafeløgunum og geva útlendingum fastlønarskipan, meðan føroyingar sita heima við hús
- Brúka 31 mió upp á sendistovur í Russlandi og USA. Tað hevur man vilja til.

Ja, eg má ásanna at Javnaðarflokkurin hevur selt seg til Høgna Hoydal og fylgi. Tað, sum Javnaðarflokkurin bjóðar mær við næstan 600 atkvøðum, er at avtaka lógina um Sandoyartunnulin. Eg má bara ásanna, at samgongan førir ein quistlingapolitikk móti Sandoynni og Suðuroynni.

*Við javnaðarkvøðu*

## Tí mugu fólk sita niðri til altjóða dystir



HERI SIMONSEN
vallarvarpari til altjóða dystir

Sigurin hjá NSÍ yvir Dinamo Tblisi var kærkomin fyri føroyskan fótbólt á mangan hátt. Hann vísti eisini, at heimadystir á grasliki veruliga kunnu koma okkara liðum til góðar í altjóða kappingum.

Øll fegnast vit um, at tey føroysku liðini kunnu vinna sær ein fyrimun við at leika á einum undirlagi, tey kenna til fulnar. Men skulu vit sleppa at spæla altjóða dystir á ovara vølli í Gundadali í framtíðini, so er neyðugt, at øll spæla við. Til altjóða dystir eru altjóða reglugerðir galdandi. Vit kunnu halda hánt um hesar reglugerðirnar, men skulu vit taka lut í altjóða kappingum, so hava vit einki annað val, enn at halda tær.

Á ovara vølli í Gundadali eru umleið 2.000 sitipláss, sum eru góðkend av UEFA. At tey eru góðkend av UEFA merkir, at fólk skulu finna sær ein sess millum hesi 2.000 sitiplássini, soframt tey ikki eru trygdarvørðar, ella eru partar av løgregluni, sløkkiliðnum ella eru fyrstu hjálpararar hjá Reyða Krossi.

Til hvønn altjóða dyst á ovara vølli er ein umboðsmaður frá UEFA á staðnum. Hesin noterar, um føroyingar halda tær altjóða reglugerðirnar, sum eru galdandi til ein altjóða fótbóltsdyst. Tað tykist, sum nøkur heilt fá viðhaldsfólk hjá báðum havnarfeløgunum ikki leggja so nógv í hesar altjóða reglugerðirnar. Viðhaldsfólkini hjá NSÍ vóru fyrimyndarlig í so máta.

Trupuleikin er bara, at kemur ein ógvuliga kantutur UEFA-umboðsmaður, sum er ein paragrafjegari, til altjóða dyst á ovara vølli í Gundadali, so kann viðkomandi notera við stórum stavum, at føroyingar ikki halda reglugerðirnar, sum eru fyriskipaðar, við tað at teir standa og hyggja, sum teir "plaga" at gera til ein Formuladyst hjá B36 ella HB.

Trupulleikin er bara fyri B36, HB, NSÍ o.o., at hesir áskoðarnir kunnu kosta okkum rættin at spæla altjóða dystir á grasliki.

So til dystin B36-Brøndby 31. juli, setið tykkum niður, so vit kunnu fáa fleiri sólskinssøgur, sum hana vit upplivdu týskvøldið.

Tillukku til NSÍ, og latið okkum stuðla teimum føroysku liðunum til evropeiskar dystir, eisini við at halda altjóða reglugerðirnar, sum eru galdandi til ein altjóða dyst.

*Við altjóða fótbóltskvøðu*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.